Fiskimálaráðið

Viðv. máli nr. 22/15883-3, Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin), brúksskylda og at leingja gildistíðina á rættindum:

Vunnin rættindi á arbeiðsmarknaðinum verða vanliga ikki afturkallað uttan so, at okkurt betri kemur í staðin. Tí vænta vit ikki, at heildarrættindini hjá skipunum versna komandi tíðina.

Felagið Línuskip fegnast um, at seinastu árini hevur verið møguligt at fiska á Flemish Kap, í Eysturgrønlandi, íslandskvotan er batnað viðv. býti millum tosk, hýsu og mix, nýggj (men lítil) kvota er nú í bretskum sjógvi, Føroya Banki er opin fyri vinnuligari veiðu og umsitingarætlanin í føroyska økinum er løgd í fastar rammur soleiðis, at broytingin frá einum ári til annað er í mesta lagi 5% - ella tað hava vit hildið.

Føroysk línuskip, sum eitt ár fiska nógv á fjarleiðunum, fiska minni í føroyskum sjógvi tað árið. Hetta er gott fyri nærleiðirnar hjá okkum, men ætlaða broytingin um brúksskyldu kann seta kílar í ta menning, sum vit hava sæð við endurnýgging frá gomlu ísfiskaskipunum til nýggjari og betri frystilínuskip, sum júst eru væl egnað at røkja fjarleiðirnar.

Prísurin fyri endurnýggingina eigur ikki at vera, at skipini av tí sama missa møguleikar, tí tey antin býta um við onnur skip fyri at gagnnýta kvoturnar á besta hátt ella fiska minni við Føroyar. Bráðliga kann tað eisini henda, at ein kvota kann minka munandi og næstan hvørva, sum vit hava sæð tað á Flemish Kap, og tá er gott at hava fiskidagar við Føroyar, tí her er hóast alt nokkso støðugur fiskiskapur, hóast hann hevur verið nakað smáligur í miðal tey nógvu, seinastu árini.

Felagið Línuskip heitir á Fiskimálaráðið at allýsa ætlaðu broytingarnar við brúksskylduni, so ongin ótilætlað broyting leggur forðingar fyri línuskipini, har tey flestu nú hóast alt hava fingið ein munandi betri rakstur enn seinastu mongu árini, nú nýggjar eginkvotur á Flemish Kap og í Eysturgrønlandi gera tað møguligt at býta kvotur um millum skipini á fjarleiðunum, har bert eitt ella tvey skip hava verið á Flemish Kap og fingið fullan túr, og fá skip hava verið í Grønlandi. Aftur fyri lata hesi kvotu aðrastaðni, so raksturin fyri øll skipini er bæði betri og skynsamari.

Ein brúksskylda kann forða slíkari effektivisering, og tað tænir hvørki reiðaríunum, manningunum ella umhvørvinum, um fleiri skip nú fara á fjarleiðirnar at fiska smáar eginkvotur heldur enn at optimera raksturin, sum skip og manningar sjálvi kunnu skipa innanhýsis, júst tí tað ber til við teimum eginkvotunum, sum blivu ásettar í fjør.

Um brúksskylda verður á eginkvotunum og føroysku fiskidøgunum, so kunnu hesi rættindini detta burtur hjá nøkrum skipum, og samlaða rakstrargrundarlagið verður tá tikið undan tí positivu endurnýgging, sum vit hava sæð síðani fyrsta frysilínuskipið í nýggjari tíð byrjaði sín rakstur fyri uml. 8 árum síðani. Høvuðsendamálið við broytingum eigur at vera, at umstøðurnar hjá teimum, sum reka fiskivinnu, gerast betri, og tað vóna vit at Fiskimálaráðið hevur við í heildarmyndini.

Tá ið vit fáa innkalling til hoyringsfund, kunnu vit greiða neyvari frá okkara hugsan hesum viðvíkjandi.

Vinarliga

Felagið Línuskip

Kristian Martin Petersen
skrivari